ítróttur

Nr. 139 • mikudagur • 24. juli 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Formaðurin í B36, Kristian á Neystabø, hevur góðar vónir undan dystinum móti georgisku meistarunum í kvøld.
– Um neyðuga hepni er við okkum, skuldi ein javnleikur ikki verið ómøguligur, sigur Kristian á Neystabø

Champions League:

B36 skal halda støðið

Í kvøld tekur B36 móti georgisku meistarunum Torpedo Kutaisi í returdystinum í europeisku kappingini fyri meistarar, Champions League. Fyrri dysturin fyri viku síðani endaði 5-2 til Torpedo Kutaisi, og hóast møguleikin fyri víðari luttøku ikki er góður, eru vónirnar góðar fyri heiðurligum úrsliti á Tórsvølli í kvøld

CHAMPIONS LEAGUE
Heini í Skorini

Hóast georgisku meistararnir Torpedo Kutaisi fyri viku síðani fingu fimm mál móti B36 í eystureuropeiska hitanum, varð endaliga úrslitið 5-2 roknað sum eitt heiðurligt úrslit fyri føroysku meistararnar B36. Við málum frá Magna á Lakjuni og Bárði Mortanssyni, umframt tríggjar aðrar gyltar málmøguleikar, framdi B36 eitt gott avrik, og tískil ræður um at halda støðið, tá liðini bresta saman á Tórsvølli í kvøld kl. 19. B36 hevur sostatt nakað at liva upp til, og hóast møguleikin fyri víðari luttøku ikki er góður, hevur B36 vónir um eitt heiðurligt úrslit.

Formaðurin góðar vónir

Kristian á Neystabø, formaður í B36, sigur, at hann er bjartskygdur undan dystinum í kvøld, men at tað sjálvsagt verður ein torfør uppgáva.

– Eg vóni, at vit megna at fáa eitt gott úrslit, sum t.d. ein javnleik. Men tað krevur, at vit fáa úrtøku burturúr teimum møguleikum, vit fáa, samstundis sum eitt sindur av hepni eisini skal til. Kristian á Neystabø leggur afturat, at tað ikki er serliga sannlíkt at koma víðari. At røkka hesum er kravið í minsta lagi ein 3-0 sigur, og tað viðgongur formaðurin er nakað optimistiskt at fara eftir. Um dystin væntar Kristian á Neystabø, at mótstøðuliði ikki fer at leypa á, men heldur at verja ta 5-2 leiðslu, teir hava.

Sama B36 lið

B36 liðið fer á vøllin við nøkunlunda sama liðið sum í Georgia. Einasta ivamál frá tí dystinum er annar málskjúttin, Magni á Lakjuni, sum fekk ein snudd undir venjing leygardagin, men væntandi verður hann kortini tøkur fra byrjan í kvøld. Annars er landsliðsleikarin Jens Kristian Hansen framvegis skaddur saman við ungu leikarunum Niels Joensen og Áka Mørk.

Mótstøðuliðið Torpedo Kutaisi kom til landið týsdagin, og vandu teir á Tórsvølli týskvøldið. Returdysturin í Europa Cup kappingini fyri meistaralið millum B36 og Torpedo Kutaisi verður sum áður nevnt spældur á Tórsvølli, og byrjar dysturin kl. 19.

Hagtølini tala fyri B36

Undan Europa Cup dystinum hjá B36 móti Torpedo Kutaisi í kvøld, vísa hagtølini, at B36 hevur staðið seg væl á heimavølli í europeiskum høpi

EUROPA CUP HAGTØL
Heini í Skorini

B36 hevur klárað seg væl á heimavølli í europeiskum høpi seinastu árini, og skulu vit fylgja hagtølunum, eru útlitini fyri einum heiðurligum úrsliti á Tórsvølli í kvøld til staðar. Hóast úrslitini á útivølli í Europa Cup ikki altíð hava verið eins góð, hevur B36 bert einaferð tapt sannførandi í Føroyum.

0-1 oftast komið fyri

Tað hevur bert einaferð fyrr eydnast B36 at fáa stig á heimavølli í Europa Cup, og var tað í 1-1 javnleikinum í 1992, tá Avenir Beggen úr Luxemburg var á vitjan. Málskjúttin tá var gamla landsliðshetjan Kári Reynheim.

B36 hevur seinastu fýra heimadystirnar í Europa Cup tapt við bert einum máli móti ongum, og skulu vit aftur í 1997 fyri at finna seinasta stórtapi á heimavølli, tá belgiska Racing Genk vann 5-0 á Svangaskarði.

Í 2000 var danska AB úr Gladsaxe á vitjan, og tá endaði dysturin 1-0 til AB, men hetta úrslitið var uttan iva eisini merkt av 0-8 avsmurninginum í Gladsaxe vikuna undan. Í 99 var úrslitið somuleiðis eitt 0-1 tap, tá Ankaragucu úr Turkalandi var á Tórsvølli, og sama úrslitið var galdandi í 98 og 97, tá so sterk lið sum Beitar Jerusalem úr Ísrael og Dinamo Moskva úr Russlandi vóru í Føroyum.

Sostatt hevur B36 víst góðar taktir á heimavølli í Europa Cup, og hóast einki stig er fingið til høldar síðani 1992, hevur B36 heili fýra ferðir verið bert eitt mál ov stuttir til ein javnleik. Í kvøld er so møguleikin til staðar, tá mótstøðuliði er Torpedo Kutaisi úr Georgia.

B36 á heimavølli í evropeiskum høpi

1992
Evropa Cup fyri steypavinnarar
Avenir Beggen(Lux)
1-1 – Kári Reynheim

1997
Inter Toto Cup Kappingin
Racing Genk(Bel) 0-5

1997
Inter Toto Cup Kappingin
Dinamo Moskva (Rus) 0-1

1998
Evropa Cup fyri meistaralið
Beitar Jerusalem (Ísr) 0-1

1999
UEFA Cup kappingin
Ankaragucu (Tur) 0-1

2000
UEFA Cup kappingin
AB (Dan) 0-1

– Skuffaður um vit tapa

B36 verjuleikarin Egil Zachariassen sigur, at málið er ikki at tapa dystin

Ein av týdningarmiklu leikarunum hjá B36 seinastu tvey árini, Egil Zachariassen, sigur, at ein javnleikur ella ein sigur er málið

CHAMPIONS LEAGUE
Heini í Skorini

B36 verjuleikarin Egil Zachariassen skal saman við liðfeløgum sínum úr B36 spæla returdyst móti Torpedo Kutaisi í kvøld, og Egil er bjartskygdur undan dystinum móti georgisku meistarunum.

– Eg gerist skuffaður, um vit tapa dystin, og eg haldi, at vit eiga at fara eftir einum javnleiki ella einum uppaftur betri úrsliti, sigur Egil Zachariassen, sum bæði í ár og í fjør hevur spælt mestsum allar dystirnar á aftasta plássi í B36 miðverjuni. Kravið at koma víðari er einki minni enn ein sigur við minst trimum málum, men hóast góðu vónirnar heldur Egil, at tað verður ov nógv at miðja eftir.

Egil Zachariassen var aftasti maður í B36 verjuni allan dystin í Georgia, og fær hann uttan iva nógv at síggja til aftur í kvøld.

– Fyrri hálvleikur var sera strævin at spæla niðri í Kutaisi, og vit vóru sera trýstir í verjuni. Men í seinna hálvleiki gekk nógv betri, og tað var ikki stórt øðrvísi enn at spæla í heimligu kappingini. Tískil trúgvi eg uppá stig í kvøld, endar B36 sweeparin Egil Zachariassen.

Jason Johannesen og hansara fólk hava nógv at takast við, aðrenn tey sleppa í summarfrí, tá ið vikan er úti
Nógvur fiskur er inni á gólvinum, og í gjár vitjaðu týskir fiskakeyparar
Mynd: Vilmund Jacobsen

Uppundir hendur uppundir endan

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Rættiliga nógv fiskaarbeiði hevur verið á virkinum hjá Fiskavirking í Saltangará í seinastuni. Bæði hesa vikuna og í síðstu viku eru tey farin til arbeiðis fyrr enn vanligt, og tá ið neyðugt er, verður arbeitt nakað longri enn vanligt.

Hósdagin í síðstu viku vóru partrolararnir, Jaspis og Ametyst, inni við 140.000 pundum av upsa; teir høvdu stuttan túr.

Fríggjadagin vóru Safir og Smarad í Saltangará. Skipini vóru full, 260.000 pund tilsamans.

Nú mánadagin var lemmatrolarin, Vesturvarði inni. Teir høvdu eisini nógvan fisk, eini 200.000 pund, harav sløk 190.000 pund var upsi.

Jason Johannesen, virkisleiðari, sigur, at upsin hjá Vesturvarða var hampiliga góður.

– Hetta var ikki stórur fiskur, men frægari slag, enn tað hevur verið, sigur hann.

Í summarfrí

Á Fiskavirking í Saltangará fara tey í summarfrí, tá ið hendan vikan er liðug.

Á Føroya Fiskavirking hava tey lagt tað soleiðis til rættis, at øll virkini hjá felagnum fara ikki í summarfrí í senn.

Nú farið verður í summarfrí í Saltangará, byrja tey aftur tíðliga í august í ávikavist Havn, Vestmanna og í Miðvági.

Á Fiskaviking á Tvøroyri verður eingin steðgur í summar.

Minn meg á

Føroyska Minn meg á bókin er komin til komandi skúlaár

MINN MEG Á
Heri á Rógvi

Hóast summar er, og flest øll skúlabørn hugsa um alt annað enn skúla, so er ein lítil áminning komið út, sum minnir tey á, at eitt nýtt skúlaár bíðar eftir teimum um ikki so langa tíð.

Føroyska íkastið til tær mongu lektiubøkurnar er komið útaftur. Minn meg á bókin er vorðin fastur táttur á hvørjum ári, og hetta árið verður heldur einki undantak.

Bókin inniheldur ymiskt, sum hjálpir skúlaungdómi at halda skil á sær sjálvum og skúlatinginum. Álmunakki, tímatalvur, telefontalvur og annað eru at finna í nýggju Minn meg á bókini.

Gamli revurin í Minn meg á sambandi, Annfinnur Zachariassen, hevur latið Bókadeild Føroya Lærarafelags ført arvin víðari, nú hann ikki gevur bókina út longur.

Minn meg á fæst í sølubúðunum fyri 55 kr.

Minn meg á 2002-2003

Politistur

Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.

Høvuðsuppgávan hjá politinum er:

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur ikemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.

Eitt arbeiði allan sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.

Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið– fast starv sum politistur.

Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.

Ynskir tú at vera við?

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelaganum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

Meira kunning

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 14 48 Fax 35 14 49
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. Fýra politistar skulu setast í 2003.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 1/9-2002